STUDNI
Student Grant Fund

STUÐULSMØGULEIKAR

STUÐULSMØGULEIKAR

- Studningur til hægri og styttri vinnuførleikagevandi útbúgvingar:.....**4.960 kr. pr. mðr. í 12 mðr**.
- Lægri studningur á miðnámi:.....**2.113 kr. pr. mðr. í 11 mðr.**
- Hægri studningur á miðnámi:.....**4.387 kr. pr. mðr. í 11 mðr.**
- Lán til hægri og styttri vinnuførleikagevandi útbúgvingar:.....**2.782 kr. pr. mðr. í 12 mðr.**
- Lán á miðnámi:.....**2.782 kr. pr. mðr. í 11/12 mðr.**
- Endalán:.....**7.742 kr. pr. mðr. í 11 mðr.**
- Bókastudningur:.....**4.186 kr. fyrst í skúlaárinum**
- Vistarhaldsstudningur:.....**2.925 kr. pr. mðr. í 11 mðr.**
- Barnastudningur:.....**1.150 kr. pr. mðr. í 11/12 mðr.**

- Studningur til einsamallar uppihaldarar:.....**1.762 kr. pr. mðr. í 12 mðr**.
- Barnsburðarfarloyvisstudningur:.....**4.387 kr. ella 4.960 kr. í 11 mðr**.
- Verkætlanarstudningur:.....**sí upphæddir til ferðastudning**
- Skúlagjald:.....**.í mesta lagi 100.000 kr. um árið**
- Lán til skúlagjald:.....**í mesta lagi 100.000 kr. um árið**
- Málsligt fyrireikingarskeið:.....**sí heimasíðu**

FERÐASTUDNINGUR

- Danmark:.....**1.500 kr**.
- Evropa:.....**3.100 kr**.
- Aðrastaðni:.....**.4.100 kr.**
- Ferðastudningur til børn hjá lesandi.....**.ymiskt** ↪ **Sí meira á baksíðu**

Dagført: august 2022

www.studni.fo

KUNNING OG TREYTIR:

• Lesandi á hægri útbúgvingum og á styttri vinnuførleikagevandi útbúgvingum fáa stuðul í 12 mánaðir . 12 . mánaðurin fevnir eisini um lestrarlán.

• Endalán er til lesandi, ið hava fingið tann stuðul, ið fáast kann. Treytin fyri at fáa endalán er, at tú tekur eina hægri útbúgving, ert lestrarvirkin, og at avvarðandi útbúgvingarstovnur kann vátta, at tú ert før/ur fyri at gera útbúgvingina lidna innan 1 ár.

• Lesandi á miðnámi fáa stuðul í 11 mánaðir . Einsamallir uppihaldarar á miðnámi fáa stuðul í 12 mánaðir. 12. mánaðurin fevnir eisini um lestrarlán hjá einsamøllum uppihaldarum.

• Lesandi, ið fáa serliga barnaískoytið frá Almannaverkinum, fáa harafturat studning sum einsamallir uppihaldarar í 12 mánaðir.

• Lesandi á miðnámi, undir 18 ár og eldri, ið eru uppihaldarar, t .v .s . antin eru gift, eiga børn ella hús, fáa hægra miðnámsskúlastudningin.

• Lesandi á miðnámi, ið eru 18 ár og eldri, og búgva til leigu við ávísum treytum, fáa hægra miðnámsskúlastudningin.

• Øll onnur, 18 ár og eldri, fáa lægra miðnámsskúlastudningin. Studningurin fæst sjálvvirkandi mánaðin eftir at tann lesandi verður 18 ár.

• Tey, ið eiga børn, fáa harafturat barnastudnings upphæddina fyri hvørt heimabúgvandi barnið, sum er undir 18 ár.

• Øll lesandi, ið eru 18 ár og eldri, hava møguleika at taka lán.

• Tey, ið eru undir 18 ár, fáa bókastudningin fyrst í skúlaárinum.

• Vistarhaldsstudningurin verður latin teimum, ið eru undir 18 ár og noyðast at flyta til útbúgvingarstaðið. Fjarstøðan millum heim og útbúgvingarstaðið skal í minsta lagi vera 35km.

• Barnsburðarfarloyvisstudningurin verður veittur í sambandi við barnsburð og ættleiðing. Studningurin er tann sami, sum tann lesandi vanliga fær. Bæði foreldrini kunnu ikki samstundis fáa barns burðar farloyvisstudningin.

• Skúlagjald kann verða goldið til hægri útbúgvingar uttan fyri Norðurlond, tó í mesta lagi kr. 100.000 um árið. Um skúlagjaldið er hægri, kann tann lesandi læna upp til kr. 100.000 um árið frá Studna. Í ávísum førum er møguligt at veita henda stuðul í Norðurlondum.

• Verkætlanarstudningur er ein ferðastudningur til verkætlanir til lesandi á hægri útbúgvingarstovnum í Føroyum og uttanlands í sambandi við størri verkætlanir, ið skulu gerast í øðrum landi enn í lestrarlandinum.

• Ferðastudningur innanoyggja. Ókeypis ferðaseðil við bussi aftur og fram í skúla hvønn dag. Søk Strandfaraskip Landsins.

• Málsligt fyrireikingarskeið er ein skipan, ið veitir stuðul til málslig fyrireikingarskeið til hægri útbúgvingar í ikki enskttalandi londum, og er ætlað teimum, ið hava ætlanir um at lesa hægri lestur í hesum londum.

• Ferðastudningur er til lesandi, ið leita sær til onnur lond í útbúgvingarørindum. Lesandi og børn teirra hava møguleika at koma heim til Føroya eina ferð um árið.

Sí nærri kunning um freistir v.m. á heimasíðuni www.studni.fo ella á facebooksíðuni hjá Studna.